## Gunnar um Mark Hughes

- Havi nógva virðing fyri honum, tí hann hevur roynt sera nógv sum leikari. Hann er ikki tann, sum snakkar nógv, men tá hann snakkar, er tað bara at lurta eftir. Hann er ein fair maður, sum mær dámar væl.



## ... um skaddar føroyska spælarar

- Tað merkist so væl, tá tað eru so fáir leikarar uttanlanda. Tí um til dømis 3 av 5 eru skaddir, merkist tað beinanvegin, men um talið hevði verið 20 útav 100 so hevði tað ikki merkts á sama hátt. Gunnar vísur heldur ikki aftur, at skifti frá graslíki til gras hevur ein týdning.



Gunnar Nielsen er ein av málmonnunum í enska felagnum Blackburn, og hóast hann dagliga venur saman við fyrstaliðs hópinum, heldur hann, at tað framvegis er langur vegur, áðrenn hann fær fyrsta dystin á liðnum

# Gunn
# stjør

**- Eg má fara til venjing sum til ein dyst, tí annars kann eg lættiliga detta ímillum í hópinum við øllum teimum góðu leikarum, vit hava, sigur føroyski málmaðurin Gunnar Nielsen, sum dagliga venur millum stjørnur í enska Premier League felagnum Blackburn**

### Ítróttarprofilurin



**Ólavur Guttesen**
post@sosialurin.fo

Undirritaði hevur eina avtalu við Gunnar Nielsen kl. 17.00 uttanfyri McDonald í miðbýinum í Manchester. Trupuleikin er bara tann, at tað eru tvær McDonalds matstovur, og undirritaði hevur ikki verið í Manchester áður. Vit finna tó hvønn annan, og vit leita okkum innar til hugnaligu matstovuna Café Rouge.

Gunnar hevur frí henda dag, og